Fylgiskjal 9

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting: **28. mai 2018**
Tygara ref.:
Máltal.: **18/00362-3**

**Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)**

Við skrivi, dagfest 6. apríl 2018, hevur Heilsu- og innlendismálaráðið sent Mentamálaráðnum omanfyrinevnda løgtingslógaruppskot til ummælis.

Sagt skal verða frá, at Mentamálaráðið tekur undir við, at tað við lógini um fyrisiting av margfeldinum verða settir greiðir lógarkarmar fyri, hvussu sitið verður fyri náttúruni í Føroyum.

Mentmálaráðið hevur sent løgtingslógaruppskotið til viðmerkingar hjá Tjóðsavninum, sum kemur at svara Heilsu og innlendismálaráðnum beinleiðis við avriti til Mentamálaráðið.

Mentamálaráðið heldur tað vera sera skilagott við ásetingunum í lógaruppskotinum um økisvernd (Kap. 5 ) har m.a. mentanarminni (§ 32) verða nevnd. Annars hevur Mentamálaráðið ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Martin Næs
*deildarstjóri*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo